# Svartkalvi

**Jákup Sverri, túrur nr. 2124**
**Tíðarskeið: 27/5-4/6 2021**
**Ábyrgd:** Lise H. Ofstad

**Endamál:** *Høvuðsendamálið við túrinum er at kanna svartkalva: Nøgd, longd, vekt, aldur, kyn og kynsbúning. Umframt skulu kanningar eisini gerast av øðrum fiskasløgum (m.a. longu, brosmu og blálongu), sum verða fingin.*




---

## Samandráttur

Fyribilsúrslit frá árliga svartkalvatúrinum vísir í miðal 66 kg av svartkalva hvønn troltíma (Mynd 1). Í miðal fyri árini 1995-2020 vóru fiskað 115 kg av svartkalva um tíman, so í 2021 var veiðan umleið helvtina av miðal og á sama stigi sum í 2020. 24 støðir vórðu tiknar og bert ein varð ikki góðkend. Magakanningar vístu, at svartkalvi í høvuðsheitum etur svartkjaft. Nytrur av svartkalva (Mynd 2) vórðu aldurslisnar umborð. Fyribilsúrslit vísir, at meginparturin av nytraðu fiskunum var millum 6 og 9 ár. Veiða, tal av nytrum, magar v.m. sæst í Talvu 1.




*Mynd 1. Kg av svartkalva per troltíma. Miðalveiðan fyri árini 1995-2020 sæst sum ein stiplað linja.*


*Mynd 2. Svartkalvanytrur.*

## Um túrin

Fóru av Havnini kl. 20:00 hóskvøldið 27. mai. Sigldu í ein landnyrðing út á 500 metra dýpi og tovaðu okkum eystureftir, kring Fugloyartunguna og so suðureftir á Munkagrunnin. Sigldu síðani til dýpið sunnan fyri Føroyabanka um kvøldið 31. mai. Har varð tovað í tveimum økjum, áðrenn kósin aftur varð sett móti vestursíðuni á Munkagrunninum. Komu á Havnina kl. 6:35 tann 2. juni orsakað av tekniskum trupulleikum við ísmaskinuni. Tóku ís og landaðu samstundis. Fóru av Havnini aftur kl. 14:20 við kós móti djúpa økinum eystan fyri Fugloyartunguna, har vit vóru til midnátt 4. juni. Dagarnir 5. til 9. juni vórðu nýttir til at samanbera stálrist og plastikkrist á upsaleið (túrur nr. 2125). Veðrið var gott allan túrin.

## Prøvatøka

Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og Sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytrur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri. Búningarstigini til botnfisk (bústig 1-7, talva 4.4.1 í Sýnishondbókini) vóru brúkt fyri øll fiskasløg, undantikið gulllaks (bústig 1-7, egin), kongafisk (bústig 1-4, talva 4.4.3) og havtasku (bústig 1-5, egin).

## Reiðskapur

Stjørnutrol við 135 mm meskum í posanum. Rockhopper grunnur (24-24in), Seahunter Vágslemmar (6.5$m^2$; 2.250kg). 60/120 m breitlar. Starmon-Oddi temperatur- og dýbdarmátari festur í stálslíra á høvðuslínuni.

## Viðmerkingar

Viðmerkingar (smálutir av ymsum slagi) til túrin eru skrivaðar í imp-útskriftirnar.

## Fólk við frá Havstovuni

Lise Helen Ofstad (kanningarleiðari)
Mourits Mohr Joensen, Marit Pedersen og Jógvan Olsen (Vónin).

*Talva 1. Veiða, nytrur, magar, kruvd vekt, gonaduvekt, livurvekt og tal av støðum pr. fiskaslag.*

| Fiskaslag | Kg í alt | Nytrur | Magar | Kruvd | Gonada | Livur | Tal av støðum |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| SVARTKALVI | 8043.66 | 310 | 148 | 231 | 144 | 147 | 22 |
| TINDASKØTA | 1126.54 | | | | | | 23 |
| TRANTKONGAFISKUR | 858.66 | 11 | 10 | 11 | 11 | 10 | 17 |
| ÍSHAVSSKØTA | 718.33 | 0 | 15 | 15 | 9 | 15 | 11 |
| HALAHVASSA SKØTA | 461.40 | 0 | 3 | 3 | 1 | 3 | 12 |
| TOSKUR | 216.77 | 15 | 11 | 3 | 3 | | 4 |
| STÓRI KONGAFISKUR | 160.96 | 9 | 2 | 6 | 6 | 4 | 11 |
| HAVMÚS | 153.71 | | | | | | 1 |
| HVÍTASKØTA | 152.78 | | | | | | 6 |
| SLANGUSTJØRNA MEDUSAHØVD | 142.36 | | | | | | 7 |
| BLÁGÓMUR | 130.57 | | | | | | 13 |
| BLÁLONGA | 109.56 | 30 | 12 | 16 | 15 | 14 | 6 |
| SVARTKJAFTUR | 96.44 | | | | | | 22 |
| BROSMA | 82.41 | 32 | 6 | 15 | 9 | 6 | 12 |
| LONGA | 77.35 | 11 | 2 | 7 | 7 | 7 | 3 |
| UPSI | 54.48 | 6 | 2 | | | | 2 |
| KLINGRUSKØTA | 28.53 | | | | | | 12 |
| LÁLLA | 26.58 | | | | | | 9 |
| HVALSPÝGGJ | 25.77 | | | | | | 7 |
| HAVTASKA | 18.37 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 |
| GULLLAKSUR | 11.12 | 4 | | | | | 4 |
| HVASSASPREK | 9.43 | | | | | | 10 |
| RÍSNA LANGASPORL | 8.54 | | | | | | 1 |
| ÚLVFISKUR | 8.06 | | | | | | 6 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 7.94 | | | | | | 2 |
| KRYTTLINGUR | 3.54 | | | | | | 3 |
| LÍTLA BROSMA | 1.68 | | | | | | 1 |
| ROGNKELSI | 1.31 | | | | | | 1 |
| LOLIGO | 1.04 | | | | | | 1 |
| STEINBÍTUR | 0.98 | | | | | | 1 |
| REYÐA HORNABROSMA | 0.71 | | | | | | 1 |
| AGNHØGGUSLOKKUR | 0.42 | | | | | | 1 |
| SILD | 0.24 | | | | | | 1 |
| ELEDONE | 0.18 | | | | | | 1 |
| ÚLVFISKABRÓÐIR | 0.13 | | | | | | 1 |
| LÍTLA LAKSATOBIS | 0.10 | | | | | | 2 |
| ÍSHAVSSÚGFISKUR | 0.05 | | | | | | 1 |
| LODNA | 0.02 | | | | | | 1 |
| YMIST (ostur, skrambul v.m) | 174.30 | | | | | | |
| TILSAMANS | 12914.97 | 429 | 212 | 308 | 206 | 207 | |